## Ungir føroyingar royna seg

Fleiri ungir føroyskir fótbóltsspælarar royna seg í løtuni í útlendskum feløgum. Onkrir spælarar hava verið avstað. Rógvi Holm úr AB hevur vant í Tottenham í eina viku, og hann skal møguliga til annað enskt felag at royna seg eisini. Christian Høgni Jacobsen og málmaðurin Gunnar Nielsen hava roynt seg í Milton Keyes, og Adrian Cieslewicz hevur verið í Manchester City. Seinni í hesi vikuni fer Kristoffur Jakobsen til FC Keypmannahavn at venja eina tíð. Aðrir spælarar skulu eisini royna seg uttanlands í ár.

## Solskjær ársins spælari

Norska spælarafelagið NISO hevur valt Ole Gunnar Solskjær til ársins norska fótbóltsspælara í ár. 33 ára gamli álopsspælarin hevur verið nógv skaddur seinnu árini, men nú hevur hann rættiliga fingið gongd á spælið hjá sær aftur. Solskjær var ikki til staðar at taka ímóti heiðrinum.

- Eg eri ótrúliga stoltur og samstundis flóvur, tí at eg ikki eri saman við spælarunum, nú eg vann hendan heiðurin. Eg helt, at møguleikin fyri, at eg skuldi fáa heiðurin var so lítil, at eg legði aðrar ætlanir, segði Solskjær við blaðið VG.



# bólti



*Tey bestu innan føroyskan fótbólt 2006. Standandi eru tað Hanna Isaksen, GÍ, Simona Heinesen, AB, Elin Katrina Haraldsen, AB, Christian Høgni Jacobsen, NSÍ, Arnbjørn Hansen, EB/Streymur, René Tórgarð, EB/Streymur, Rólant Højsted, formaður EBS/treymi og Petur Reinert Dómari. Húkandi eru Jákup á Borg, HB, Jón Harald Poulsen, KÍ og Steinfinnur Mittelstein, sum tók móti heiðrinum fyri burturstadda Krzyzstof Popczynski*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Tey bestu

### Gylti skógvurin, latin av Thomas Dam ítrótti

**Kvinnur**
Hanna Isaksen, GÍ 28 mál

**Menn**
Christian Høgni Jacobsen, NSÍ 18 mál

– – –

### Ársins málverji

**Kvinnur – latið av Com-Data**
Simona Heinesen, AB

**Menn – latið av Poul Hansen/Samkeyp**
René Tórgarð, EBS/treymur

– – –

### Ársins venjari

**Kvinnur**
Jón Harald Poulsen, KÍ

**Menn – latið av Articon**
Krzysztof Popczynski, HB

– – –

### Ársins stjørnuskot

**Kvinnur – latið av Føroya Sparikassa**
Hanna Isaksen, GÍ

**Menn – latið av Føroya Sparikassa**
Arnbjørn Hansne, EB/Streymur

– – –

### Ársins dómari – latið av Kjølbro
Petur Reinert

– – –

### Ársins spælari

**Kvinnur – latið av Atlantic Airways**
Elin Katrina Haraldsen, AB

**Menn – latið av Atlantic Airways**
Jákup á Borg, HB

## Kykmyndir í Miðla-húsinum

**Á portal.fo ber til at síggja kykmyndir frá handanini av virðislønunum, eins og prátað verður við fleiri av teimum, sum tóku ímóti heiðrinum**